# Spennandi læruplάss í køkinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi

Hevur tú  hugin og viljan at læra at gera heilsugóðan og fjølbroyttan mat? so er tað møguliga tær vit leita eftir.

Køkurin á Klaksvíkar sjúkrahúsi søkir eftir einum føðsluatstøðaralærlingi (ernæringsassistent) til setan 1. juni 2019 ella eftir avtalu.
Vit bjóða eitt spennandi lærupláss í einum góðum og fjølbroyttum umhvørvi, við dugnaligum starvsfeløgum.

**Vit ynskja at tú:**

- ert ágrýtin, álítandi og ábyrgdarfull-/ur
- dugir at samskifta í skrift og talu, og dugir at nýta teldu á brúkarastøði
- møtir væluppløgd/ -lagdur til tíðina
- hevur gott handalag
- hevur ein jaligan hugburð, sum stuðlar einum góðum arbeiðsumhvørvi

Vit leggja stóran dent á gott og erligt samstarv, har tú ert virkin og tekur ábyrgd fyri at fáa eina so góða útbúgving sum gjørligt.

**Skúlakrøv**

- Í minsta lagi 9. flokksprógv frá fólkaskúlanum
- Grundskeið á 20 vikur innan matvøruútbúgving (grundforløb)

**Lærutíðin er 3 ár. Skúlagongdin er 30 vikur í lærutíðini, tríggjar ferðir 10 vikur skúlaskeið á tekniskum skúla í Danmark.**
Útbúgvingin gevur eina grundleggjandi vitan um matvørur, føðslu og matgerð. Tú lærir um matvørugóðsku, matvørureinføri og at gera heilsugóðan og vælsmakkandi mat.
Meira kunning um útbúgvingina sæst á heimasíðuni http://www.ernaerings-assistent.dk/

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmála millum Kost- og føðslufelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

**Royndartíðin** er 6 mánaðir.

**Nærri fæst at vita** við at venda sær til Elisabeth Akursmørk, kostfakligan leiðara, á tlf. 229229

**Umsóknarfreistin** er 22. apríl 2019

Upprunaprógv og viðmæli skulu havast við til samrøðu.

Les meira “um okkum” á www.ks.fo